# Listasavn Føroya

**søkir eftir savnsleiðara og listfrøðingi**

Listasavn Føroya er tjóðlistasavn Føroya. Savnið er sjálvsognarstovnur, sum verður rikin við rakstrarjáttan frá Føroya Løgtingi, Tórshavnar kommunu, stuðli frá grunnum og við egnari fígging. Endamál stovnsins er at savna og skjalfesta føroyska list og við skiftandi framsýningum at tryggja vitan um føroyska list í Føroyum og útlondum.

Í sambandi við broyttan leiðslubygnað verður lýst eftir einum savnsleiðara og einum listfrøðingi, ið skula standa fyri savnsrakstrinum. Teir skula í felag leggja fíggjarætlan, listarliga ætlan og aðrar virkisætlanir og saman við stýrinum leggja til rættis karmarnar fyri savnið. Umframt hetta hava teir ábyrgdina at røkja og menna virksemið bæði innan og uttan fyri savnið.

Fyri framman eru stórar avbjóðingar, ikki minst í sambandi við kunning, varðveiting og marknaðarrøkt. Tað hevur stóran týdning, at tey nógvu listaverkini hjá savninum, bæði tey í egnum goymslum og tey, ið eru lænt stovnum og fyritøkum, verða sjónligari og atkomulig, soleiðis at nýggjar og áhugaverdar dyr latast upp.

Listasavn Føroya søkir eftir tveimum fólkum, ið eru virkisfús, ágrýtin og framtakshugað. Tey, ið sett verða, skulu hava góð samstarvsevni, so tey kunna virka sum ein skapandi eind. Ein serstøk uppgáva er at útbyggja og menna samstarvið við tað skapandi føroyska myndlistaumhvørvið.

Savnsleiðarin hevur ovastu ábyrgdina av rakstrinum á savninum.

**Setanartreytir:**
- Størvini eru áramálssett í 5 ár við fyrsta árinum sum royndartíð.
- Starvið sum savnsleiðari verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.
- Starvið sum listfrøðingur verður lønt sambært avtalu millum Listasavn Føroya og avvarðandi yrkisfelag.
- Stýrið setir savnsleiðaran eftir tilmæli frá Listafelag Føroya og felagnum Føroysk Myndlistafólk.
- Fyrivarni verður tikið fyri bygnaðarbroytingum, ið kunnu hava umskipan av størvunum við sær.

**Umsóknin**
Skrivlig umsókn saman við CV, prógvum og øðrum upplýsingum, ið hava týdning fyri umsóknina, skulu vera stýrinum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2004 og stílast til:

**Listasavn Føroya**
**Postrúm 1141**
**FO 110 Tórshavn**

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Gunnar Hoydal, formann í stýri listasavnsins, tlf. +298 312849, ella til Helga Fossádal, tlf. + 298 313579 ella 298 214282

## Savnsleiðari

**Ábyrgdin hjá savnsleiðaranum er**
- Savnsfyrisiting, herundir fíggjarstýring, fíggjarætlanir, gransking og umsiting.
- Marknaðarrøkt og samband við fjølmiðlar.

**Vit vænta, at tú**
- hevur hóskandi hægri útbúgving og góðar royndir innan leiðslu.
- ert ágrýtin, skipaður, virkisavgjørdur og hevur gott samfelagsligt innlit,
- hevur áhuga fyri list og listasavnsumsiting,
- hevur góðan telduførleika,
- hevur lætt við at orða teg bæði í skrift og talu, og harafturat hevur góðar málkunnleikar.

**mrk.:"Savnsleiðari"**

## Listfrøðingur

**Ábyrgdin hjá listfrøðinginum er**
· Myndasavnsrøkt, framsýningar, kunning , varðveiting, skráseting, gransking og útlán av listaverkum.
· Framsýningar, ritútgávur, umsóknir og samband við samstarvspartar.

**Vit vænta, at tú**
- ert útbúgvin listfrøðingur við royndum innan listasavnsøki.
- ert uppfinningarsamur, hugaður, opin og ábyrgdarfullur.
- hevur áhuga fyri og kunnleika til føroyska list.
- hevur góðan telduførleika.
- hevur lætt við at orða teg bæði í skrift og talu, og harafturat hevur góðar málkunnleikar.

**Mrk.: "Listfrøðingur"**

Sosialurin 341800




Minnist til haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!




– síðsti rættstundis gjaldsdagur var 28. mars 2004

Arjgjavegur 26 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01 · e-mail: post@sosialurin.fo **Sosialurin**

# FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvi , adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

# VITAMUN

Kostískoytið, ið dugir




Urtir mineralir og vitaminur í einum

Fæst hjá **siri** liv & heilsa
Siri spf • Dr. Jacobsensgøta 18 • FO 100 Tórshavn
Telefon 31 66 10 • Fax 31 66 10

-tað loysir seg

# Gartnari

Starv sum býargartnari í Fuglafjarðar kommunu verður við hesum lýst leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

Talan er um fulltíðarstarv, og verður lønin ásett sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og CV verða í seinasta lagi tann 15. apríl 2004 kl. 15.00 at senda til:

Fuglafjarðar kommunu.
Teknisku deild
Postboks 30
530 Fuglafjørður

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Pætur Joensen, býarverkfrøðing (e-postur: patur@fuglakomm.fo), ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara (e-postur: jfl@fuglakomm.fo) Tlf 444006.

*Fuglafjørður tann 23. mars. 2004*
**Fuglafjarðar kommuna**

# *Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 · 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Sosialurin 341800



**Góðska á hægsta støði, hevur eitt navn!**
**Spyr sjálvandi eftir**

ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR



# Gerið kvettið:

**1 Echostar boks og 1 skermur**

**Við í prísinum eru:**
- 10 rásir frá BBC
- 4 andaligar rásir
- 1 barnarás
- 2 filmrásir
- 3 tíðindarásir
- og fleiri aðrar

Fyri einans **2.995,-**

**Allar eru gjaldsfríar rásir**

**Dragon modulir, ið kenna næstan alt, eru nú aftur at fáa fyri kr. 1.500,-**



**Alt til parabol og sjónvarp nú á goymslu, so sum motorar modulir og mangt annað**

**Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tel 42 14 11 ella 21 53 28**




**Nógv onnur góð tilboð á www.bio.fo/skyinterline**

**Hoyring**

# Hoyring av Ferðaætlanini 2004

Uppskot til Ferðaætlanina 2004 er til almenna hoyring frá 30. mars til 13. apríl 2004.

Ferðaætlanin kann takast niður á www.ssl.fo ella við at venda sær til SL.

Viðmerkingar skulu sendast skrivliga til SL á ssl@ssl.fo ella við vanligum posti, merkt Ferðaætlan.

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

REPROZ

# Bilar til sølu

**SsangYong Rexton RX290 4WD *"7 setur"***



prísur **290.000,-**

· Árgang 2003 · km 22.500 · Aut. gear · 2,9 Turbo diesel intercooler · Automatiska í- og úrkoblan av 4WD · Centrallás · Fjarstýrdan lykil · Tónaðar rútar · Krók · Lættmetalfelgur við dekkum · Pioneer anlegg við fløguspælara · Vælhildin

**Citroen Jumpy 2,0 TD Vørubilur**



prísur við mvg **120.000,-**

· Árgang mai 1998 · Km 80.000 · Radio, el-rútar, nýlakkeraður, í sera góðum standi.

**Renault Mégane 1,6 Coupé**



prísur **49.500,-**

· Árgang 1996 · Km 149.000 · 1,6 bensinmotor · Summardekk á sportfelgum · Radio og píkadekk fylgja við.

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 51 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Sosialurin 341800

# Dansifrøi



# Frá Dansifrøi

Vit dansa saman við hetlendingum í kvøld. Byrjað verður kl. 19.30.

**Dansifrøi**

# Stuðlar til Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktar-uppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin ynskir stuðlar, ið m.a.:

- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamøll í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión
- vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellir
- eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- eru sterkir - bæði til sálar og likam
- kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

Søkt verður eftir stuðli til:

**Sandavágur**
***Kvinna við ALS - Vøddasvinn***. Talan er um 30–35 tímar um vikuna, við skiftandi vaktum. At byrja 01.05.04, freistin at søkja er 15.04.04.

**Sørvágur**
***Maður við rørslubreki***. Talan er um 16 tímar aðru hvørja viku, seinnapart. At byrja 1. apríl ella skjótast gjørligt.

**Tórshavn**
***18 ára gamal menningartarnaður drongur***. Talan er um 14 tímar um vikuna, serliga seinnapart. Freistin at søkja er 15. 04.04.

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi dag-, kvøld, og vikuskiftisarbeiði.
Løn sambært viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita hjá serráðgeva, Odu Johansdóttir, tlf: 354024 el. Fía Jespersen, tlf: 344029.

Umsóknir saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu sendast til:

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin**
Att.: Oda Johansdóttir
Niels Finsensgøtu 28, 2. hædd, Fo-100 Tórshavn,
Tlf. 354024 - Telefax 354021

W W W . S O S I A L U R I N . F O